# ER POSH TANN NÝGGJA ALEXIS?

Victoria Beckham er í løtuni besta boðið til leiklutin sum bretska superbitjin Alexis í nýggju filmútgávuni av risa sjónvarpsrøðini Dynasti ella Dollars, sum hon æt í Danmark og Føroyum. Sambært Daily Star leita tey eftir einum glamorøsum, men samstundis eitt sindur afturhaldandi persóni til leiklutin. Elizabeth Hurley hevur verið upp á tal, men hon er sambært blaðnum ov gomul. Eb.dk veit at siga, at tað eru Tom Cruise og Katie Holmes, ið hava nevnt Victoriu fyri skaparanum av Dynasti Aaron Spelling. Talan verður annars um ein stórfilm við eini ørgrynnu av stjørnum.



*Joan Collins sleppur ongantíð av við ímyndina av henni sum Alexis*



*Posh Spice, Frú Beckham og nú kanska Alexis, Victoria hevur duga at valt stórar leiklutir í sínum lívi.*

## MISTI STARVIÐ, TÍ PARIS HEVÐI UNGAN SJEIK



*(Mynd: Scanpix)*

Ein trygdarvørur í náttklubbanum Body English í Hard Rock Hotel í Las Vegas hevur mist starvið, ein annar er fyribils sendur til hús, og náttklubbin hevur fingið eina ávaring, eftir at Paris Hilton tók sín alt ov unga sjeik við inn í klubban. 25 ára gamla Paris hevur fjasast við 19 ára gamla Stavros Niarchos, og á síni vitjan á náttklubbunum Body English og á Tao Asian Bistro í Las Vegas hevði hon tikið sjeikin við, hóast talan er um 21 ára aldursmark í tílíkum klubbum í Las Vegas. Løgreglan hevur kannað málið, og hevur ávarað klubbarnar um, at tílíkt ikki eigur at endurtakað seg, skrivar Pittsburgh Tribune.

## KATE MOSS DÝRARI ENN NAKRANTÍÐ



*(Mynd: Scanpix)*

Kate Moss er sambært The Sun tætt við at undirskriva eina sáttmála áljóðandi £ 1,5 milliónir við Calvin Klein. Hetta er annar sáttmálin hjá Moss við Calvin Klein, og hesin gevur tvífalt so nógv sum tann fyrri.

Hetta hendir seks mánaðar eftir, at fólk spáddu, at hennara yrkisleið sum model var av, aftan á at myndatól í einum tónleikaupptøkuhølum vístu myndir av Kate Moss og távерandi sjeikinum Pete Doherty, ið sniffaðu kokain.

Beint eftir hendingina segði klæðnaframleiðarin Burberry sáttmálan við Moss upp, men eisini hetta felag hevur nýggja sáttmála við Moss í umbúna, skrivar The Sun. Moss hevur verið til avvenjingar, og hetta hevur eftir øllum at døma hjálpt - í øllum førum fíggjarliga.

## JESSICA TORDI ILLA AT FARA FRÁ NICK



*(Mynd: Scanpix)*

Í samrøðu við US weekly greiður songkvinnan og veruleikasjónvarpsstjørnan Jessica Simpson frá, at hon illa tordi at fara frá manni sínum Nick Lachey. Tí hon ikki vildi skuffa fólk, ið høvdu fingið ímyndina av teirra fullkomiliga eydnusama hjúnarlagi. Men nú hevur hon skilt, at tú kanst ikki gera onnur glað, um tú ikki ert glað sjálv. Tí valdi hon at enda hjúnarlagið. Ein avgerð hon er sannførd um, var tann rætta. Hon sigur við blaðið: "Tá tú fert, og einki togar í teg fyri at verða verandi, so veist tú, at tú hevur tikið røttu avgerina".

Bæði Jessica og Nick royna seg sum sangarar, men veruliga heimsumfatandi stjørnustøðan, kom tá tey lótu MTV filma teirra hjúnarlag fyrstu tíðina, í sendingi Newlyweds.

